

# okkur við pulleikum

rokktónleik við kristnum boðskapi.

### 80'ini og 70'ini

Ofta vóru sangirnir bygdir upp spakuliga, og hildu á leingi. Bestu løturnar vóru, tá ið teir hildu á at leggja meira og meira orku í ein sang, og Ulf ordiliga slepti teymunum á sær.

Ljóðið var 70'arakent, meðan melodiirnar meira hoyrdu heima í 80'unum. Sangirnir vóru bæði á svenskum og enskum, eins og teir hava givið fløgur út á báðum málunum.

Menninir í Jerusalem spældu væl – so væl sum man spælur aftaná 30 ár. Ómakaleyst og samanspælt.

### Gittartrupulleikar órógvaðu

Tíverri var konsertin nógv darvað av tekniskum trupulleikum. Bassurin hoyrdist mest sum ikki alla fyrru helvtina av konsertini, og verri var, at gittarin hjá Ulf ofta bleiv púra burtur. Fyrsti sangurin "City of Fire" steðgaði upp, tí Ulf ikki fekk gittaran at rigga, og í fleiri øðrum sangum sást týðuliga, at hann var frustreraður av teknisku trupulleikunum. Onkuntíð hildu hinir einum sangi koyrandi í fleiri minuttir, meðan Ulf og ein gittarkeknikari royndu at fáa tað at rigga aftur.

Men teir hildu tó á at rokka gamla eyðkenda rokkin, og tey eldru í fjøldini fingu sítt nostalgiupplivilsi. Tað segði tó ikki øllum so nógv, og fjøldin tyntist eitt sindur, tá ið tey ungu heldur vildu inn í Kelduna at kroka enn at hoyra 70'ararokk.

Konsertin hjá Jerusalem endaði á sama hátt sum hon byrjaði – við at gittarin hjá Ulf steðgaði upp og harvið sangurin. Og so takkaðu teir bara fyri seg.

# um

seg kenna seg heldur forfylgdan av illveðri.

### Søtt í beiskum búna

Bólkurin spældi eitt slag av progressivum nútíðarpoppi, sum leiddi tankarnar til bólkar sum Carpark North, men eisini til íslendska popp gandakallin Mugison.

Røddin hjá Peturi hevur karakter og er egin, hon er tó dekan ov sukursøt, og hetta kann lætt gera tónleikin eitt sindur vamlisligan. Men í Petur Háberg konseptinum hendur hetta ikki. Bólkurin spælir eitt beiskt, skitið og ópolerað bland, og tí blívur tað ongantíð ov søtt. Petur er ikki longur singer/songwriter, men er vorðin ein habilur popp/rokk sangari, og hetta er vert at gleðast um. Í fyrsta lagnum, royndi Petur seg einsamallur á pallinum við kassagittara. Hetta undirstrikaði bara enn meira, hvussu gott tað er, at hann hevur fingið ein hart rokkandi bólk at spæla saman við.

### Sjarma og sjálvsálit

Hann er ein sangari, sum er ómetaliga sjarmerandi og dugir væl at vinna hjørtu. Vælklæddur, penur og gjøgnumført fittur. Hann hevur eisini eitt ótrúligt sjálvsálit, og hóast ein strongur slitnaði, so helt hann fram, og spardi ikki upp á orkuna. Tú kundi ikki annað, enn at lata teg smitta av spæligleðini, ið strálaði ikki bert frá Peturi, men eisini frá bólkinum, ið veruliga tyktist at elska at spæla henda tónleik.

# Óruddiligt men áhugavert

**Humble Cry er ein nýggjur bólkur, ið á sín egna óruddiliga trilvandi hátt, lat leygardagin á Fjarðafestivalinum upp. Framførslan vísti, ungu menninir kunnu blíva góðir, um teir venja og menna hugskotini**

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Fyrstir at framføra leygardagin vóru nakrir ungir mans úr Meinigheitshúsinum í Havn. Bólkurin Humble Cry var stovnaður í samband við HMU-konsertina í mars, og hetta var onnur framførsla teirra.

Humble Cry borðreiddi við popputum rokki, sum onkuntíð var meira melankolskur og dapur. Teir byrjaðu eitt sindur trilvandi, men fingu betur stýr á, sum konsertin leið.

Humble Cry er ein nýggjur og rættiliga ungur bólkur, og teir spæla eitt sindur óruddiligt. Teir høvdu fleiri góð hugskot, men hava avgjørt tørv á meiri venjing og á at arbeiða meira við hugskotunum.

### Gulir bønarlepar

- Vit fara at hava eina eitt sindur snediga konsert, legði sangarin fyri við at siga.

Og har vóru onkur heldur annarleiðis ting við. Á pallinum stóð ein hvítur krossur. Tríggjar gentur í hvítum búnum fóru ímillum fólkini at savna bønarevni inn á gulum lepum, og so vórðu hesir klistraðir uppá krossin. Genturnar løgu so á knæ og bóðu fyri hesum alla konsertina.

Allir sangirnir uttan ein vóru á enskum. Tekstirnir vóru á til tíðir nokkso undarligum enskum. Tað snúði seg um trupulleikar og tankar, sum tannáringar hava, serliga um tað at vera kristin. Tannáringa angist og trúðarstríð.

### Uppfinnsamt

Gittarin var allatíðina fremst í ljóðmyndini. Í sanginum "Black Holes Holy" sang gittarspælarin Sámal Jákup við hásari rokkrødd. Í endanum spældi hann eisini blokkfloytu afturvið melankolska rokkinum, sum eisini royndi at fara yvir í progressivan rokk. Hetta var nokk besti sangurin á konsertini. Í seinasta sanginum var tað hinvegin sum at hoyra Faith No More við "Easy", og hin sangarin ljóðaði nú sum ein svartur prædikumaður. Fjølbroytt.

Tað var ikki polerað spæl, men tað var til tíðir rættiliga uppfinnsamt, og tað menti seg til eina spennandi og annarleiðis konsert. Har er nógv at arbeiða við, og ungu menninir kunnu blíva góðir, um teir venja og menna hugskotini.



*Humble Cry duga væl at finna uppá, nú skulu teir bara arbeiða við sínum uppfinningum*
*Mynd: Edith Johannesen*